## Seinasti teinurin

| Nr. | RyggNr. | Navn | Felag | Aldur | Bólkur | Tíð | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 28 | Thomas Japp Hansen | Cycling Gladsaxe | 22 | A | 02:43:37 | 34,84 |
| 2 | 33 | Ivan Kristensen | Cycling Gladsaxe | 33 | B | 02:44:05 | 34,74 |
| 3 | 27 | Gunnar D. Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 38 | H30 | 02:48:08 | 33,90 |
| 4 | 29 | Niels Jakob Thomsen | Cycling Gladsaxe | 25 | A | 02:48:08 | 33,90 |
| 5 | 35 | Gregers Rosdahl | Cycling Gladsaxe | 31 | C | 02:49:11 | 33,69 |
| 6 | 30 | Gunnlaugur Jonasson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 41 | H40 | 02:51:16 | 33,28 |
| 7 | 39 | Eli Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 18 | Begynder | 02:56:02 | 32,38 |
| 8 | 31 | Sverri M. Edvinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 37 | C | 02:56:02 | 32,38 |
| 9 | 25 | Gunnar M. Zoega | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 29 | 02:56:02 | 32,38 | |
| 10 | 24 | Alfreð Harðarson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 29 | 02:59:43 | 31,72 | |
| 11 | 26 | Haukur M. Sveinsson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 19 | 03:00:47 | 31,53 | |
| 12 | 42 | Jørgen Green | RCR | 65 | H60 | 03:20:23 | 28,45 |
| 13 | 41 | Stig Helm Hansen | Cycling Gladsaxe | 38 | Motión | 03:30:28 | 27,08 |
| 14 | 37 | Evald Rasmussen | Tórshavnar Súkklufelag | 46 | Motión | 03:56:40 | 24,08 |

Ikki gjøgnumført
0 Eyðtór J. Joensen
0 Beinir Rasmussen
0 Kári Simonsen
38 Bárður Husgaard
40 Christian Guttesen
44 Danjal Michaelsen
36 Jákup Johansen

Ungdómar uml. 80 km

| Nr. | RyggNr. | Navn | Felag | Aldur | Bólkur | Tíð | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 43 | Bergur Ingemarsson | Tórshavnar Súkklufelag | 14 | Junior | 02:57:37 | |

Ikki gjøgnumført
45 Hans Krosstein



*Thomas Japp Hansen ovast á sigursskamlinum. Nummar tvey var Ivan Kristensen og á triðja plássi var Gunnar Dahl-Olsen*

# U-17 til Noregs

LANDSLIÐ
*Stefan í Skorini*

Venjarin hjá U-17 landsliðnum, Bill McLeod Jacobsen, hevur sent boð eftir átjan spælarum, nú landsliðið skal luttaka í NM í Noregi komandi dagarnar.

Ferðalagið fer avstað úr Vágunum leygardagin 26. juli og kemur aftur til Føroyar tann 4. august.

Føroyska liðið skal spæla fýra dystir. Tríggjar dystir í bólkaspælinum og síðani ein plaseringsdyst.

Fyrsti dysturin er týsdagin 29. juli ímóti Skotlandi, og dagin eftir skal føroyska liðið møta Svøríki. Síðsti dysturin í bólkaspælinum verður fríggjadagin 1. august ímóti Finnlandi. Sunnudagin verður plaseringsdysturin leiktur.

Hesir leikarar eru úttiknir: Bárður Mittelstein, Poul Thomas Dam, Christian R. Mouritsen, Pætur T. Jørgensen, Ólavur í Ólavsstovu og Tróndur Kragesteen úr HB. Jóhan Davidsen og Einar Hansen úr NSÍ. Borgar Kristiansen úr Skála. Urbanus Olsen og Kristoffur Jacobsen úr KÍ. Jóhan V. Gunnarsson og Ásbjørn V. Gunnarsson úr B36. Jón Krosslág úr VB. Sam Jacobsen og Per Jacobsen úr GÍ. Andreas Lava Olsen og Rógvi Ryggshamar úr ÍF.

Bill McLeod Jacobsen er venjari, og hjálparvenjari er Heðin Askham. Liðleiðari er Rúni Heinesen og Fanny Kruse er fysioterapeutur.

# Marathon við í morgin

RENNING
*Stefan í Skorini*

Leygardagin skipaði Bragdið fyri marathon renning. Runnið varð úr Havn til Kaldbak og aftur. Cecil Weihe vann kappingina frammanfyri Sigurð B. Justinussen.

Meira verður at frætta frá marathon-renningini í blaðnum í morgin, tá vit prenta tíðir og myndir frá renningini.

# Ólavsøkurenningin sunnudagin 27. juli

Sunnudagin tann 27. juli kl. 16 skipar Bragdið fyri rennikappingum á Skálatrøð í Havn. Kappast verður í ymsum bólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingunum er á Skálatrøð.

Byrjað verður kl. 16.00, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður nakrar ferðir runt niðri á Skálatrøð og út á Bakka.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, so verður kappast í tveimum aldursbólkum: vaksin fødd í 1985 ella fyrr, og vaksin fødd í 1957 ella fyrr (veteranar). Vinnandi maðurin og kvinnan fáa steyp, harumframt fáa nr. 1, 2 og nr. 3 heiðursmerki. Nr. 1, 2 og 3 í veteranbólkunum fáa heiðursmerki.

Kappingin á Ólavsøku er samstundis síðsta umfar í árligu Grand Prix kappingini fyri vaksin og børn. Á heimasíðuni www.athletics.fo er kunning um støðuna í Grand Prix kappingini, undan Ólavsøku.

Børnini byrja at renna kl. 16.45 tá dreingir og gentur - 7 ár (f. 1996 ella seinni) renna eina ferð runt, t. e. 600 m. Síðani renna dreingir og gentur - 10 ár (f. 1993-1995) sama tein

Tey størru børnini skulu renna 2 ferðir runt, t. e. 1200 m. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir og gentur - 13 ár (f. 1990-1992) og dreingir og gentur - 17 ár (f. 1986-1989).

Nr. 1, 2 og 3 í teimum ymisku bólkunum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki. Vinnarin fær harumframt steyp.

Handan av steypum til nr. 1, 2 og nr. 3 í Grand Prix kappingini hjá bæði vaksnum og børnum, verður eftir at fremstu rennararnir á Ólavsøkurenningini eru heiðraðir.

Tilmelding kann bert gerast á www.athletics.fo og startnr. skulu heintast uttan fyri handilin hjá P/F Valdemar Lutzen kl. 14.30-15.30. Luttøkugjald kr. 50,00 skal flytast í Føroya Banka, á konto 6460 166.239.4. Tilmeldingin er bert galdandi um goldið verður beinanvegin umvegis peningastovn. Tilmeldingarfreistin er leygardagin kl. 12.00.


*Bogi Lenvig vann ólavsøkurenningina í fjør, og spennandi verður at síggja, um hann kann endurtaka sigurin í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Skrá:

14.30-15.30 Heintan av startnummari á Skálatrøð

16.00-16.45 Vaksin (fødd í 1985 ella fyrr) renna 5 km

16.45-17.30 Børn - kappast í hesi raðfylgju:

Børn - 7 ár (f. 1996 ella seinni) renna 600m
Børn - 10 ár (f. 1993-1995) renna 600m
Børn - 13 ár (f. 1990-1992) renna 1200m
Børn - 17 ár (f. 1986-1989) renna 1200m

17.30 Heiðursmerkja- og steypahandan



# Christian Høgni aftur á vongverjanum

**Nýggi Vejle venjarin tykist hava sama álit á fyrrverandi NSÍ spælaranum, sum venjarin í fjør hevði**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*


*Nýggi Vejle venjarin tykist hava sama álit á fyrrverandi NSÍ spælaranum, sum venjarin í fjør hevði*

Mánadagin í síðstu viku fór Christian Høgni Jacobsen niður aftur til Vejle. Hann hevði í ein stóran mánað verið í Runavík, og í fleiri landskappingardystum var hann á miðvøllinum og í NSÍ álopinum.

Undan summarsteðginum spældi Christian Høgni millum lítið og einki við 1. deildar liðnum hjá Vejle. Venjarin metti Christian Høgna at vera álopsspælara og ikki vongverja, men hann helt samstundis, at tað vóru fleiri aðrir, sum stóða frammanfyri Christian Høgna at fáa álopsplássini. Tí var føroyski spælarin ofta als ikki í ferðalagnum, tá ið besta Vejle liðið spældi.

Nú er Steen Thychosen venjari. Um mett verður út frá fyrsta venjingardystinum hjá Vejle, sum í vikuskiftinum fer undir nýggja roynd at endurvinna sær pláss í superliguni, so ætlar venjarin, sum sjálvur er gamal álopsspælari, at Christian Høgni skal spæla á vongverjanum í høgru.

Vejle spældi týskvøldið í síðstu viku á útivølli í Odense ímóti B1913, sum eisini er í næstbestu deildini. Úrslitið var 2-2, eftir at Vejle beinanvegin var komið á odda 2-0 og hevði hildið tørn um leiðsluna inntil steðgin. Í 2. hálvleiki skoraði B1913 tvær ferðir.

Hóast Christian Høgni ikki hevur verið í Vejle álopinum leingi, og hóast hann als ikki var á liðnum undan summarsteðginum, so verður hann á landsliðnum framvegis roknaður sum álopsspælari. Tað sást, tá ið landsliðið spældi undankappingardystir undan summarsteðginum og serliga, tá ið landsliðið spældi tveir vinardystir ímóti Kasakstan.

# Julian aftur í eldin hóskvøldið

**Higartil hevur tað ikki hilnast væl hjá Akranesi, sum framvegis er í vanda fyri at flyta niður**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í Íslandi gongur tað mesta fyri seg mitt í viku, tá ið tað ræðum um fótbólt. Í vikuskiftinum hava eingir dystir verið spældir. Tað hevur ikki verið spælt síðani hóskvøldið í síðstu viku, tá ið Akranes hevði heimavøll ímóti FH. Úrslitið var málleysur javnleikur, og tað var vónbrot fyri ÍA. FH er á sjeynda plássinum, og við sigri á teimum hevði ÍA lyft sær nærri trygd fyri framhaldandi luttøku í bestu deildini.

At tað ikki eydnaðist at skjóta mál ímóti FH undirstrikar, hvør størsti veikleikin hjá skagamonnum er í ár. Í ellivu teimum fyrstu landskappingardystunum hevur tað bara eydnast ÍA at skjóta tíggju mál. Tað er størsta orsøkin til soltnu úrtøkuna higartil.

Hóskvøldið skulu ÍA og Julian Johnsson aftur í eldin, og tað er hópin størri avbjóðing, enn tað átti at havt verið, tá ið FH vitjaði. ÍA skal spæla á útivølli ímóti Þrótti, sum hevur staðið seg so mikið væl, at teir eru næstfremst í landskappingini.

# Rosenborg tapti fyri fyrstu ferð

**Mótstøðuliðið hjá NSÍ tapti, og endiliga eydnaðist tað Molde at vinna, tá ið teir á heimavølli gjørdu av við Sogndal**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Áhugin í Føroyum fyri norsku landskappingini man ivaleyst vera minkaður, nú eingin føroyskur spælari er knýttur at nøkrum felag í bestu deildini. Tað kann ikki sigast annað enn at vera ein nýggj støða, tí heilt síðani Julian Johnsson fór til Kongsvinger og hann seinni spældi saman við Kurt Mørkøre og Hans Fróða Hansen í Sogndal, hevur føroyskt íslett verið í norskum fótbólti. Hesi bæði seinastu árini hevur tað fyrst og fremst verið Jákup Mikkelsen, sum hevur verið í Molde.

Nú er áhugin ivaleyst mest tengdur at, at bæði KÍ og NSÍ seinnapartin av august skulu spæla í UEFA Cup kappingini ímóti ávikavíst Molde og Lyn.

Tað hevur fleiri ferðir verið umrøtt, at Rosenborg hevur megnað at spæla so leingi í hesum kappingarárinum uttan yvirhøvur at tapa. Tað hevur verið tosað um, um tað fór at eydnast teimum í Tróndheimi sum fyrsta felagnum nakrantíð at spæla eitt heilt kappingarár í bestu deildini uttan at tapa. Sunnudagin varð greitt, at tað fer ikki at eydnast. Rosenborg var í trettanda umfarinum á útivølli ímóti Tromsø, sum telist millum botnliðini. Trettan talið vísti seg óheppið fyri Rosenborg, tí Tromsø vann 2-0, sum eisini var støðan í steðginum. Hetta var fyrsta tapið hjá Rosenborg, síðani Åge Hareide, sum inntil í fjørsummar var venjari í Brøndby, fekk ábyrgdina fyri liðnum.

Hjá Molde glapp tað leygarkvøldið á heimavølli. Teir høvdu vitjan av Sogndal, sum varð sent til hús við 3-1 tapi, eftir at gestirnir í steðginum høvdu verið frammanfyri 1-0. Molde er fjórði aftast, og Sogndal er nummar fýra.

Bodø/Glimt, sum er næstfremst, hevði vitjan av Odd Grenland, sum varð sent aftur til Skien við 1-0 tapi. Tað eru tíggju stig frá Bodø og fram til Rosenborg. Viking hevur møguleika at stinga seg inn á næstfremsta plássið, um tað eydnast teimum at vinna útsetta dystin ímóti Molde. Hesa ferð var Viking Stavanger á útivølli ímóti Stabæk, sum tapti 2-0.

Lyn, sum NSÍ skal spæla ímóti í Europa Cup, hevur ikki havt nakað serligt kappingarár. Teir eru mitt í røðini, og tað er Lillestrøm eisini. Hesa ferð vann Lillestrøm 2-0 á heimavølli ímóti Lyn. Bryne vann 2-0 á Aalesund.